# Tunnilin skapt lív í Vágum



*Umboð fyri tríggjar av smærru kommunum í Norðoyggjum vóru eisini við á evnisdegnum. Millum hesar var Kunoyar kommuna, sum var umboðað av borgarstjóranum, Heina O. Heinesen, sum helt at tað átti at verið ókeypis at koyra gjøgnum tunlarnar. Honum við lið stendur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági og løgtingsmaðurin, Jørgen Niclasen*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Fólk í Vágum eru sera fegin um Vágatunnilin. Men tey hava tó eittans ynski: At tað skal gerast bíligari at koyra gjøgnum hann. – Eingin ivi er um, at hesin kostnaður heldur fólki aftur í at brúka tunnilin meiri, sigur Edvard Joensen, leiðari á Vága Kunningarstovu. Leygardagin skipaði hann fyri evnisdegi um týdningin av Vágatunlinum tey seinastu trý árini**

EFTIRMETING
*Snorri Brend*

**Vágar:** – Vágatunnilin hevur verið til stórt gagn fyri okkum í Vágum. Fólkatalið er økt munandi. Eftirspurningurin eftir sethúsum er vaksandi og tað er prísurin eisini. Og vinnan hevur fingið nýggjar avbjóðingar.

– Men hinvegin so kann vinnan ikki kappast á jøvnum føti við restina av landinum, tí kostnaðurin at koyra gjøgnum tunnilin skapar ójavna kapping.

Hetta var nakað av tí, sum kom fram á evnisdegnum, har bæði umboð fyri vinnuna, politikkarar og onnur tóku samanum tey trý árini, sum hesin undirsjóvartunnilin hevur verið opin.

Hetta málið hevur eisini áhuga fyri kommunurnar í Norðoyggjum, og tí vóru umbð fyri tríggjar av smærru kommunum við á fundinum. Av einihvørjari orsøk var eingin úr tí størsti, Klaksvíkar kommuna.

Tað var Edvard Joensen og Vága Kunningarstova sum skipaðu fyri tiltakinum. Og hann er væl nøgdur við tað:

– Vit fingu staðfest, at fólk eru fegin fyri tunnilin. Samstundis var tað eitt breitt ynski um, at tað eigur at gerast bíligari at brúka hann.

– At fáa tunnilin goldnan niður sum skjótast verður uttan iva eitt av málunum, sum verður tikið fram í komandi tíðum, sigur hann.

## Ójøvn kapping

Tað er altíð gott at fáa staðfest tað, ein hevur varhugan av. Og tað fingu tey so sanniliga, tey sum vóru á pallborðsfundinum í Miðvági leygardagin.

Evnið fyri fundin var støðan í Vágum, nú meiri enn trý ár eru liðin síðani Vágatunnilin lat upp.

Her var sligið fast, at henda nýggja farðleiðin hevur verið til stórt gagn fyri oynna og fólkið, ið her býr.

Eitt er, at fólkatalið er økt munandi. Eitt annað er so tað, at vinnulívið hevur fingið eitt skump uppeftir, men samstundis eisini fingið øðrvísi avbjóðingar í kappingini.

Sum dømi varð nevnt, at flutningur av fiski av oynni hevur ein eyka kostnað við sær, tí allur fiskurin verður bert avskipaður úr Havn. Her mugu virkini sjálvi bera henda kostnað fyri flutning – ein kostnað, sum virkini á meginøkinum ikki noyðast at gjalda.

– Her er tí talan um ójavna kapping, varð víst á.

## Ein eksplosjón

Á fundinum í Miðvági kom fram, at fólkatalið í oynni er økt við 4,5 % síðani 2002.

Hetta er eitt rættiliga stórt tal, tá ein sammetir við vøksturin í talinum av føroyingum í síni heild. Frá 2002 og fram til 2005 vaks fólkatalið í Føroyum nevniliga bert við 1 %.

Tvær orsøkir eru til henda stóra vøksturin í Vágum: Fyrst er at siga, at tað eru fleiri føðd enn deyð í Vágum hesi árini.

Hinvegin so hevur eisini eitt týðiligt rák verið, at heilar familjur eru fluttar vestur í Vágar hesi trý árini.

Tað er vorðið munandi lættari hjá fólki at búgva í Vágum, og finna sær arbeiði har ella aðrastaðni.

Til ber í dag at staðfesta, at av teimum 484 føroyingunum, sum vit gjørdust fleiri frá 2002 til 2005, vóru teir 127 í Vágum. Hetta svarar til meiri enn fjórða hvønn føroying.

– Ja, skal ein hyggja aftur í tíðina, so byrjaði vøksturin í fólkatalinum longu tá teir fóru undir at grava fyri Vágatunlinum.

– Ein kann siga, at tann fyrsta eksplosjónin til Vágatunnilin, skapti hesa eksplosjónina í fólkatalinum, sigur Edvard Joensen.

## FAKTA

Indeks fyri sethúsaprísir

| | |
|---|---|
| 1999 (áðrenn byrjað varð uppá tunnilin): | 100 |
| 2001 (meðan arbeiðið er í gongd): | 101 |
| 2002 (tá tunnilin letur upp): | 117 |
| 2003: | 140 |
| 2004: | 140 |
| 2005: | 121 |

## FAKTA

Bilar um Vestmannasund

Við Strandferðsluni: Einir 350 bilar um dagin
Gjøgnum Vágatunnilin – vanligar dagar: 1100 bilar
Gjøgnum Vágatunnilin – tá ókeypis er at koyra: Um 4000 bilar hvønn vegin

# Vilja varðveita hvalastøðina



*Eitt uppskot skal nú gerast um, hvussu Hvalastøðin við Áir skal varðveitast*

**Sundalagið:** Hvalastøðin við Áir hevur ligið nærum í órøkt í alt ov nógv ár.

Men nú er ætlanin at fáa hetta søguliga staðið aftur til heiður og æru.

Í hesum sambandi hevur Mentamálaráðið heitt á Sunda kommunu um at velja eina lim í ein arbeiðsbólk, sum skal orða eitt uppskot um, hvussu henda hvalastøðin við Áir eigur at varðveitast.

Í arbeiðsbólkinum verða eisini umboð fyri Mentamálaráðið, Landsverk og Fornminnissavnið.

Á fundi í Sunda kommunu í kvøld skal hetta umboðið veljast. Trivnaðarnevndin mælir til at velja borgarstjóran, Heðin Zachariassen, og tí verður tað uttan iva hann, sum verður umboðið hjá kommununi í arbeiðsbólkinum.

**sb.**

# Tvær ferðir fult hús sama dag

**Havn:** Seinastu vikuna varð skipað fyri árligu missiónsvikuni í Meinigheitshúsinum í Havn.

Byrjað varð næstseinasta sunnukvøld og varð hildið fram til í gjár, tá ikki færri enn trý tiltøk vóru í húsinum.

Nógv fólk hava verið til møtini, men í gjár var tó dagurin, tá flest fólk leitaðu sær í húsið.

Fyrst var sunnudagsskúli hildin kl. 14, og tá mundi eini 400 børn og foreldur vera til staðar. Kl. 18 var aftur møti, tá sama talið, møguliga enn fleiri, vóru til staðar. Seinni um kvøldið var aftur møti á skránni. Íalt mundu vera eini 900 fólk til hesi trý tiltøkini.

Missiónsvikur verða hildnar um alt landið um veturin. Hesa vikuna eru missiónsvikur í Kollafirði og Fuglafirði.

**sb.**

# Betri umstøður hjá avbygdabátum

**Vestmanna:** Nú kunnu bátar úr øðrum bygdum liggja trygt við bryggju í Vestmanna.

Kommunan hevur nevniliga skipað soleiðis fyri, at avbygdabátar kunnu fáa fast pláss í bátahylinum í bygdini. Einasta treytin er, at ein serstakur sáttmáli er gjørdur um tað.

Sigast kann, at henda ætlanin er kærkomin, tí longu nú hava sjey báteigarar boðað kommununi frá, at teir eru áhugaðir í eini slíkari loysn.

Til tess at forða fyri, at ov lítið av plássi verður, hevur kommunan haraftrat bílagt íalt 20 metrar aftrat av bátabrúgvum. Henda verður væntandi klár at taka í nýtslu í mai mánaði í ár.

Samstundis við hetta verða el-trupulleikarnir loystir við serstakari gjaldsskipan, eins og gjørligt er at taka vatn á staðnum.

Fyri Vestmanna kommunu hevur trygdin eisini nógv at siga, og tí verða settir upp ljóssteyrar við bátabrúgvarnar.

**sb.**



*Vestmanna kommuna fer nú at skapa betri karmar hjá bátum hjá avbygdarfólki*